Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður: — **Meðan landsstýrið hevur arbeitt við stórum álvara við málinum hevur sambandsflokkurin antin verið ímóti ella einki gjørt. Nú kemur Pauli Ellefsen sum ketta upp úr høvdatrog**

Sambandsuppskot um Dounreay er uppá kvamsvís

— Meðan umboð sambandsfloksins í tingmannaráði útnorður segði korta nei til at mótmæla ætlaðu byggingini av einum kjarnorkuendurvinningarvirki í Dounreay í Skotlandi leggur sambandsflokkurin við Paula Ellefsen á odda nú uppá kvamsvís uppskot fram um at senda løgmann og løgtingsformannin til London at mótmæla somu bygging.

— Hvar er álvarin og logikkurin hjá sambandsflokkinum, og hví hevur Pauli Ellefsen einki gjørt fyri at fáa glið á málið, meðan hann hevur umboðað Føroyar á fólkatingi, spyr Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður í eini viðmerking til uppskotið frá sambandsflokkinum um at mótmæla Dounrey-ætlanunum

viðmerkingar

Pauli Ellefsen og sambandið tykjast vera fyri at yvirtaka uttanríkismál, nú skotið verður upp at senda løgmann og løgtingsformannin til London at mótmæla Dounrey og halda partamannin Uffe Elleman-Jensen uttanfyri

Sambandflokkurin hevur lagt uppskot fram á ting, sum m.a. sigur:

»Føroya løgting samtykkir, at Føroya løgmaður og løgtingsformaðurin fara til London at mótmæla bygging av verksmiðju til endurútvinning av kjarnorkubrennievni í Dounreay í Skotlandi. Ferðin verður skipað í samstarv við danska uttanríkismálaráðið.

Í viðmerkingunum sigur sambandsflokkurin m.a.:

»Flestu av okkum trúðu, at Føroya landsstýri tók henda spurning í álvara. Rætt er tað, at landsstýrið hevur sent donsku myndugleikunum eitt skriv, men alt týðir uppá, at danir ikki hava fingið ta fatan, at álvarin lá aftanfyri, og okkara myndugleikar sýnast ikki at hava fylgt spurningunum upp. Hóast upplýsingar frá donskum myndugleikum um, at málið var steðgað, so sýnist landsstýrið ikki at hava gjørt vart við seg í hesum álvarsama spurningi. Hetta átala vit harðliga.«

Aðrastaðni í viðmerkingunum verður sagt:

»Atburður landsstýrisins kundi bert føra til, at danir og bretar halda áðurnevnda skriv vera sent uppá kvamsvís.«

Hørð orð men hvat sigur landsstýrið

Hetta eru hørð orð. Men hvat sigur landsstýrið til hesa atfinning sambandsmanna. Løgmaður var ikki at hitta, tá vit royndu at fáa eina viðmerking, og vit hava tí biðið Vilhelm Johannesen, landsstýrismann um eina viðmerking. Hann sigur:

— Í november 1985 fekk landsstýrið eitt skriv úr Orknoyggjum, har teir lokalu myndugleikarnir í Orknoyggjum heittu á landsstýrið um at mótmæla ætlaða kjarnorkuendurvinningarverkinum í Dounreay. Landsstýrið viðgjørdi hetta skrivið beinanvegin og sendi tað til ummælis hjá danska uttanríkismálaráðnum fyri at fáa nærri at vita, hvat hetta snúði seg um. Málið kom so aftur, og í juni 1986 samtykti landsstýrið at senda mótmæli til bretsku stjórnina, og eftir stýrisskipanini so skal hetta fara gjøgnum danskar myndugleikar, t.v.s. danska forsætismálaráðið og uttanríkismálaráðið.

Síðani tá hava umboð fyri landsstýrið og landsstýrisflokkarnar nýtt eitthvørt høvi til at mótmæla ætlaða kjarnorkuendurvinningarverkinum, m.a. hava okkara umboð í Tingmannaráði Útnorðurs atkvøtt fyri at tað ráðið skuldi senda eitt mótmæli eisini.

Umboðini fyri landsstýrið og landsstýrisflokkarnar hava eisini á norðurlandaráðsfundinum fyri stuttum tikið undir við, at Norðurlandaráðið skuldi mótmæla.

Sambandið einki gjørt

Men hvat hevur so sambandsflokkurin gjørt? spyr Vilhelm Johannesen.

— Hann hevur havt møguleika at reisa hetta málið á tingi fyrr, tí málið er ikki heilt nýtt. Áheitanin frá orknoyingum kom í 1985, men sambandsflokkurin hevur ongantíð latið við seg koma.

Sum fólkatingsmaður hevur Pauli Ellefsen eisin ihavt høvi til, ja hann hevur kanska havt skyldu til at fylgt við, hvat bleiv av mótmælinum hjá landsstýrinum. Bleiv tað liggjandi inni hjá forsætismálaráðnum og uttanríkismálaráðnum ella varð tað veruliga sent viðari til London? Men tað hevur Pauli Ellefsen heldur ikki gjørt. Hann metir tað meira týdningarmiki at taka sær av sambandsáhugamálum á fólkatingi heldur enn at umboða Føroyar sum so. Pauli Ellefsen kundi t.d. havt reist ein fyrispurning í fólkatinginum og spurt eftir málinum. Og tað kundi Óli Breckmann eisini havt gjørt, men hvøgin av teimum hevur gjørt tað.

Haraftrat er vert at undirstrika, at í tingmannaráðnum fyri útnorður, atkvøddi umboðið fyri sambandsflokkin ímóti, at vit skuldu mótmæla yvirfyri bretsku stjórnini.

Annars er at siga, at hetta uppskotið hjá sambandsflokkinum er eitt sera áhugavert uppskot.

Misálit á danir

Fyri tað fyrsta, sigur Vilhelm Johannesen viðari, so er hetta eitt uppskot um misálit á danskar myndugleikar og serstakliga á partamannin hjá sambandsmonnum og hjá Paula Ellefsen, nevniliga Uffe Ellemann-Jensen, sum er uttanríkismálaráðharri. Fyri tað næsta, so er hetta ein dyggilig álitisváttan á fyrst og fremst okkara løgmann og á løgtingsformannin, tí uppskotið miðar ímóti, at teir skulu fara til London, t.v.s. at gera tað arbeiðið, sum annars danski uttanríkismálaráðharrin skuldi gjørt.

Fyri tað triðja má ein meta hetta sum eitt stig á leiðini til yvirtøku av uttanríkismálum, so tá ein sá hetta uppskotið og fór at lesa tað, fór ein at ivast í, um tað veruliga var komið frá sambandsflokkinum og ikki frá onkrum av sjálvstýrisflokkunum.

Tøa ein so tosar um, at danir hava fingið ta fatan, at álvarin lá ikki aftanfyri skriv landsstýrisins, so má tað vera tí, at teir ikki hava funnið út av, at Pauli Ellefsen er farin frá sum løgmaður. Tí tann tíðin, tá mál vóru viðgjørd uttan álvari lá aftanfyri, er farin, og tá ein so eisini tosar um, at skrivið varð sent uppá kvamsvís, so haldi eg, at er nakað uppá kvamsvís, so er tað sambandsfloksins leikluitur í hesum máli.

Tí tá vit hugsa um, at sambandsflokkurin ongantíð hevur reist málið á tingi fyrr enn nú aftaná, at aðrir hava tosað og arbeitt við tí leingi, og sambandsflokkurin hevur gingið ímóti tí í tingmannaráði útnorðurs, hevur ikki fylgt málinum upp í fólkatinginum, men nú kemur við einum uppskoti, sum átalar landsstýrið fyri ikki at hava arbeitt nóg dugliga í málinum, so má ein siga, at hetta stigið hjá sambandsflokkinum er uppá kvamsvís, sigur Vilhelm Johannesen í viðmerkingunum.

jan

ÚTRÓÐRARBÁTAR

SCANIA 28'-32' og STARLET 26'-29'



SCANIA 32'

— útgjørdur við 127 hk Ford, hydr. stýring, aluminiums vindeygum, hurðum, lúkum og øllum skottum.

Kostnaður ab. Tórshavn

Kr. 524.860,-.

Fígging 10-15 ár

Vit fíggja eisini søla av tygara brúkta plastbáti.

Tlf. 05 15 20 07

ella

BJARNE JUUL PEDERSEN,

tlf. 1 46 29

Tit ringja — vit skriva



Ringið telefon

11820